

www.oljan.fo

**Jan Müller** 28 - 02 - 2013

# Grønland eigur at gera sum Shell

Nú Shell hevur gjørt av at bíða við oljuleitingini norðan fyri Alaska, mælir umhvørvisverndarfelagsskapurin Greenpeace grønlendska landsstýrinum til at leggja seg í kjalarvørrin av avgerðini hjá niðurlendska oljufelagnum. -Teir grønlendsku politikararnir eiga at umhugsa støðuna og at kanna málið eina ferð afturat. Tað er sjálvandi ikki av ongum, at eitt av heimsins størstu oljufeløgum leggur sínar ætlanir í Arktis til viks. Viðurskiftini har eru so ólík viðurskiftunum aðrastaðni í heiminum, og umhvørvið er so viðbrekið, at landsstýrið eigur at steðga á, sigur Jon Burgwald, sum er talsmaður hjá Greenpeace í viðurskiftum viðvíkjandi Arktis, við grønlendska kringvarpið. Jon Burgwald sigur, at Greenpeace er serliga ørkymlað av teirri ætlaðu oljuleitingini í Eysturgrønlandi. Í umhvørvishøpi hevur hetta økið ómetaliga stóran týdning, og harafturat gevur tað oljuvinnuni heilt aðrar avbjóðingar, enn hon er von við. Greenpeace heldur ikki, at grønlendingar eiga at loyva oljuleiting har. Greenpeace-talsmaðurin sigur við KNR, at hann viðurkennir rættin hjá Grønlandi at gagnnýta landsins ráevni, men hann heldur, at grønlendingar eiga at leggja seg eftir teimum sjáldsomu evnunum í jørðini heldur enn olju. -Grønlendingar hava at kalla ongar royndir við oljuleiting, og teir eiga at fara varisliga fram, sigur Jon Burgwald við kringvarpið í Nuuk.